# gi er skilagott

heimsins fremstu tjóðir um 10 ár.

– Er málið at verða fremst innan vinnulív, tøkni, á bústaðarøkinum ella sum heild. Tað hava vit einki hoyrt um, sigur hon.

Heidi heldur, at málið hjá landsstýrinum sjálvsagt eigur at vera, at Føroyar teljast millum fremstu tjóðir á øllum økjum – og uppi í hesum partinum er vælferðin og búskapurin sjálvsagt ein týðandi og náttúrligur partur.

– Fjórða evnið fevnir um "Viðurskifti okkara við ES, og her heldur løgtingskvinnan, at vit heilt vist eiga at taka henda táttin upp beinanvegin, soleiðis at okkara marknaðaratgongd til ES verður lættari og betri.

Hon vísir á, at Tjóðveldisflokkurin er ímóti ES-limaskapi, men neyðugt verður at fáa eina betri handilsavtalu upp á pláss – eina avtalu, sum vinnulívið kann liva við.

– Eg haldi, at hetta málið má loysast beinanvegin, tí okkara vinnulív kann slett ikki liva við støðuni, soleiðis sum hon er í dag.

## Gransking og útbúgving

– Tað, sum eg serliga sakni í yvirskriftunum hjá landsstýrinum til evnisdagarnar, er, at har stendur einki og gransking og útbúgving.

Heidi sigur, at hon sær gransking og útbúgving sum eina fyritreyt fyri, at vit skulu kunna lyfta samfelagið frameftir.

– Eg haldi, at vit mugu seta meira pening av til vinnugransking, eins og neyðugt verður at hækka útbúgvingarstøðið í Føroyum.

Hon vísir á, at skerdu játtaninar til vinnugransking, sum sitandi landsstýrið hevur framt, samsvara eftir hennara tykki ikki við ætlanir landsstýrisins um at menna føroysku tjóðina.

– Sitandi samgonga hevur gjørt tvær fíggjarlógir, og í báðum førum hava teir skert granskingina, og haraftrat er KT-útbúgvingin tikin frá Fróðskaparsetrinum, tí fíggjarvánir ikki vóru til at halda fram.

Hon heldur, at henda tilvildin ikki kann halda fram – um vit vilja framá.

– Tað er nevniliga granskingin og KT-tøknin, sum eru grundarlagið undir einum framkomnum nútíðarsamfelag.

Heidi sigur, at samgongan undan hesari økti játtanina til gransking, men hon ásannar, at hetta var ikki nóg mikið.

– Nú hevur so sitandi samgonga aftur skert granskingina, og tað haldi eg vera ógvuliga óheppið, leggur hon aftrat.

## "Karmar" um vinnuna

Løgtingskvinnan sigur, at vit í Føroyum hava tosað nógv um karmar fyri vinnulívið, men hon heldur, at hetta kjakið er alt ov lítið ítøkiligt.

– Vit hava ongantíð tosað ítøkiliga um, hvørjar karmar vit í veruleikanum ynskja um vinnulívið.

Hon heldur, at tað er neyðugt at skera út í papp, hvørjar kamar vit vilja geva vinnulívinum og síðan virka har eftir.

– Í øðrum londum hava tey vinnuráð og ráðgevingarbólkar, sum ráðgeva myndugleikunum. Eg haldi, at vit mugu optimera tær almennu tænasturnar, sum vit hava til vinnulívið, eitt nú Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Djóralæknatænastuna.

Hon vísir á, at eitt, sum vinnan ofta rennur seg í, er, at Føroyar ikki altíð verða viðurkendar sum myndugleiki.

– Tað er ikki altíð, at keyparalandið viðurkennur stempulið hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Tey kunnu finna upp á at siga, at Føroyar og Danmark eru eitt land, og vendur vinnan sær til Danmarkar, siga danir, at teir hava einki við føroyskan útflutning at gera.

Heidi heldur ikki, at Djóralæknatænastan hevði nóg góðar umstøður at virka undir, tá ið vit spældu alivinnuna av hondum.

– Eg haldi eisini, at Menningarstovan eigur at fáa betri umstøður, soleiðis at stovnurin í nógv størri mun enn í dag kann verða ein viðspælari hjá vinnulívinum.

## Ígongdsetan og flutningur

Heidi Petersen heldur, at vit noyðast at hava nakað av ígongdsetarastuðli í Føroyum, soleiðis at vit í nógv størri mun kunnu fjøltátta um okkara vinnulív og framleiðslu.

- Eitt er marknaðaratgongdin, sum eg nevndi fyrr í samrøðuni, sum alneyðugt er at gera nakað við beinanvegin. Í øðrum lagi mugu vit gera nakað munandi við flutningsskipanina, bæði sjóvegis og loftvegis, soleiðis at møguleikarnir hjá vinnuni verða betraðir.

Hon sigur, at við altjóðagerðini noyðast vit at tora at taka kappingina upp við aðrar.

– Vit noyðast eisini at brynja okkum til at gera íløgur uttanlands. Hetta er eitt mál, sum vit noyðast at seta okkum í felag – myndugleikar, fíggingarstovnar og privata vinnulívið. Sjálvsagt skulu allir partar ikki taka sær av somu viðurskiftum, men hava eitt ítøkiligt uppgávubýti sum sigur, hvør tekur sær av hvørjum.

Løgtingskvinnan vísir á, at eitt nú okkara grannalond hava tryggjað sær marknaðir uttanlands við at keypa sølufeløg og framleiðsluvirkir niðri á meginlandinum.

## Sein á sjófarfallinum

- Eg haldi, at vit í stóran mun eru eftirbátur í framleiðslu av vørum, sum keyparin vil hava – og vil rinda góðan prís fyri. Vit hava lyndi til ikki at tillaga okkum, fyrr enn vit veruliga noyðast, og tað er spell. Vit áttu heldur at tillaga okkum og umskipa okkum í góðari tíð, sigur Heidi, sum heldur, at støðan hjá føroyskum vinnlívi er hættislig í løtuni.

Hon heldur tó ikki, at føroyingar ikki duga at tillaga seg broyttu umstøðunum, tí tað hava vit altíð duga, men tað er spell, at vit skulu bíða við neyðugu tillagingini, til vinnan er í svárari kreppu.

– Eg haldi, at føroyska vinnulívið er meira stirvið, enn tað hevði verið, um so stórur partur av virkisliðnum ikki var á almennum hondum. Okkum vantar dynamikk í løtuni, sigur Heidi Petersen, løgtingskvinna.



*- Tørvurin at seta fokus á okkara møguleikar í framtíðini hevur helst ongantíð verið størri enn í dag, sigur landsstýrið*

# Strategi fyri framtíð Føroya

**Føroyska samfelagnum tørvar eina samfelagsstrategi, sum skal tryggja vøkstur, kappingarføri, virksemi og burðardygga menning. Landsstýrið setir nú út í kortið, og málið er, at Føroyar í ár 2015 skulu teljast millum heimsins fremstu tjóðir**

MÁLSETNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Landsstýrið arbeiðir sum nevnt aðrastaðni á "Vinnusíðunum" í dag við eini sonevndari samfelagsstrategi fyri framtíð Føroya, sum ætlandi skal verða liðug í mai í ár.

Á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni síggja vit eina stutta frágreiðing um hetta arbeiði, sum er sett í verk.

## Millum fremstu tjóðir

– Í dagsins alheimsgjørda búskapi eiga vit ikki at taka okkara vælferð fyri givið. Kappingin herðist í hvørjum, og arbeiðspláss verða hótt av kappingarneytum frá láglønarlondum. Tørvurin at seta fokus á okkara kappingarfyrimunir og møguleikar í framtíðini hevur helst ongantíð verið størri.

Landsstýrið leggur tí dent á, at føroyska samfelagnum tørvar eina samfelagsstrategi, sum skal tryggja vøkstur, kappingarføri, virksemi og burðardygga menning.

– Tí fara vit at gera eina samfelagsstrategiska ætlan, ið hevur sum mál, at Føroyar í ár 2015 teljast millum heimsins fremstu tjóðir, verður sagt á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni.

## Íblástur og kunnleiki

Í sambandi við arbeiðið, sum er byrjað, er landsstýrið eisini farið undir eina røð av evnisdøgum, sum skulu geva íblástur og týdningarmiklan kunnleika.

– Á hesum evnisdøgum hava bæði føroyskir og útlendskir serfrøðingar á ymiskum økjum framløgur, og eftir framløgurnar viðger landsstýrið umrøddu evnini gjølla og ger ítøkiligar ætlanir.

Landsstýrið sigur, at fyrstu evnisdagarnir hava verið, og har hevur eitt nú verið tosað um alheimsgerð sum møguleikar og hóttan.

– Alheimsgerðing gevur møguleikar fyri menning og vøkstri, men hevur eisini við sær stórar avbjóðingar vegna broyttar og herdar kappingarumstøður.

Spurningurin í hesum sambandi var: "Hvussu troyta vit møguleikarnar, og hvussu møta vit hóttanunum?"

## Olja, ES og vælferð

Onnur evni, sum landsstýrið eisini hevur á skránni, eru eitt nú: "Eitt framtíðar oljuvinnusamfelag og útjaðarapolitikkur", og í næsta mánaði verður heitið á evnisdøgunum: "Vælferðin og búskapur" og "Viðurskifti okkara við ES".

Í apríl verða eisini evnisdagar, og tá verður yvirskriftin: "Vinnupolitikkur – karmar, einskiljingar og eitt fjøltáttað vinnulív".

Tá ið evnisdagarnir eru lidnir, fer landsstýrið at orða endaligu samfelagsstrategisku málini og at gera eina virkisætlan.

– "Strategi fyri framtíð Føroya" verður liðug í mai, sigur landsstýrið á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni.